# 17 Sangarar á konsertferð

**Mikudagin fara 17 Sangarar úr Klaksvík á eina konsertferð uttanlanda**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Mikudagin 8. mai fara 17 Sangarar á konsertferð til tveir av vinarbýunum hjá Klaksvík, nevniliga Odense og Norrkoping.

Kórið er boðið til Norrkoping av Musikalska Sallskapets Kammerkor, sum vitjaði í Føroyum í 1999.

Skráin á konsertferðini inniheldur norðurlenskar fosturlandssangir, andaligar sangir og eisini kunnu nevnast »Komm, holder Lenz!« úr Árstíðunum hjá Joseph Haydn og »Våren« hjá Edvard Grieg.

Eins og á undanfarnum konsertferðum bæði í Danmark og Noregi verða Monica Strauss Joensen og Helga Hilmarsdóttir Gerðalíð við á ferðini, og fara tær at spæla onkur tónleikastykkir fyri violin og klaver.

Fyrsta konsertin verður í Ansgars Kirkjuni í Odense mikukvøldið 8. mai, og er hetta triðju ferð, at kórið vitjar hesa kirkju.

Seinni sama kvøld verður eisini sungið í Kerte Kirke.

Í vikuskiftinum verður sungið ymsastaðni í Norrkoping og Soderkoping. Eisini Immanuelskirkjan í Norrkoping verður vitjað.

17 Sangarar koma heim aftur komandi sunnudag.

Umborð á Alfa Pilot:

# – Fólk halda, at verkfallið er púra meiningsleyst!



*Hvønn dag flytir Alfa Pilot um 200 fólk um fjørðin*



*Torleif Sigurðsson situr við róðrið umborð á Alfa Pilot, tá Sosialurin fer við um Leirvíksfjørð*

**Ein av smábátunum, ið flytir fólk um Leirvíksfjørð, nú verkfallið er, hevur navnið Alfa Pilot. Torleif Sigurðsson er útgerðarmaður umborð, og vit hittu hann við róðrið ein morgunin**

VERKFALL
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Klokkan nærkast 8 á morgni, og bussurin er júst steðgaður við Statoil-støðina í Leirvík.

Úr bussinum koma fólk í øllum aldri, og ein sær týðiliga, at klokkan enn ikki er vorðin so nógv. Tey síggja troytt og lin út, men um eina lítla løtu byrjar arbeiðsdagurin, so nú er at skunda sær.

Fleiri av fólkunum renna oman á bátabryggjuna. Her liggja fleiri smærri bátar, og nú ræður um at skunda sær umborð, so ein fær pláss inni í hitanum. Um tú ert ov seinur á veg, verður tú standandi uttanfyri í sjórokinum.

Ein av bátinum á bryggjuni hevur navnið Alfa Pilot. Hetta er eitt stuttleikafar á 17 tons, sum hevur tveir motorar, hvør við 240 HK.

Torleif Sigurðsson er útgerðarmaður umborð á Alfa Pilot, og hann er eisini við á túrinum hendan morgunin.

## Flytir 200 fólk um dagin

Torleif Sigurðsson greiðir frá, at Alfa Pilot hevur siglt um Leivíksfjørð, meðan verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum hevur verið.

Alfa Pilot siglir eftir nýggju ferðaætlanini hjá Dúgvuni, og harafturat eru eisini fleiri áðrir bátar, sum eisini sigla um fjørðin við fólki.

Norðingar hava ofta á lofti, at sambandið við meginøkið er alt ov vánaligt, og at onkrar munandi broytingar mugu fáast í lag hesum viðvíkjandi skjótast gjørligt.

Men hóast verkfallið førdi við sær, at skipini hjá Strandferðsluni góvust við siglingini, so hevur onkur tikið til, at sambandið um fjørðin ongantíð hevur verið so gott sum nú.

Hvørja løtu fer onkur bátur avstað, og eru teir so nógvir í tali, at tú altíð sleppur við onkrum.

Torleif sigur, at teir umborð á Alfa Pilot føra um 200 fólk um fjørðin hvønn dag, og eru teir fýra mans umborð, sum skiftast at sita við róðrið.

## Meiningsleyst verkfall

Sjálvur vónar Torleif, at verkfallið skjótt nærkast einum enda.

– Í løtuni er einans útjaðarin raktur av verkfallinum, og tað virkar meiningsleyst í mínari verð, sigur hann.

Onkur hevur havt eitt sindur ilt av, at teir smærru bátarnir taka siglingina hjá Strandferðsluni upp, og onkur annar hevur skotið upp, at allir bátarnir skulu gevast við at sigla. Tí ikki fyrr enn tá kemur verkfallið at hava eina veruliga ávirkan.

Men Torleif vísir á, at fólk fara ikki um fjørðin fyri at hugna sær. Tey hava ørindir, ið tey skulu fáa avgreitt aðrastaðni, og tí skulu tey ikki líða undir verkfallinum.

– Ein stórur partur av teim ungu, sum búgva í Klaksvík, skulu um fjørðin í skúlaørindum, og tey eru glað fyri henda møguleika, ið vit kunnu bjóða teimum, sigur Torleif.

Hann nevnir eisini fólk, ið arbeiða inni á meginøkinum, og harumframt eru eisini nøkur frá meginøkinum, ið starvast í Norðoyggjum.

– Tey flestu av teimum halda eisini, at tað er púra meiningsleyst, at verkfallið rakar tey, sigur Torleif.

Umframt at flyta vanlig fólk um fjørðin, so hevur Alfa Pilot eisini gjørt onkrar sjúkraflutningar. Torleif greiðir frá, at tað gjørdu teir eisini áðrenn verkfallið rakti oyggjarnar, men nú hevur verið eitt sindur meir at gjørt.

Harafturat hava teir eisini í langa tíð siglt við fólki, sum hava leigað bátin, tí ferðaætlanin hjá Strandferðsluni ikki hevur passað nóg væl inn í teirra ætlanir. Av tí sama heldur hann tað ikki verða nakað undarligt í, at teir nú flyta enn meir fólk um fjørðin.

– Tað eru ikki øll, sum eru so glað fyri, at vit sigla, sum vit gera. Men tey, sum sigla, eru glað fyri at vit eru her, endar Torleif samrøðuna, meðan við leggja at keiuni í Klaksvík.








Klaksvíkar Havn um verkfallið:

# – Ein faklig konflikt, sum rakar skeivt!

**Roynt hevur verið at fingið eitt farmaskip hjá Smyril Line at lagt at í Klaksvík, so skipið kundi taka eitt sindur av farmi av oynni. Men strandfaraskipið Scania liggur soleiðis fyri, at farmaskipið ikki slapp framat, og tískil mátti fara avstað**

VERKFALL
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Mánamorgunin kom ein sleipibátur hjá Tórshavnar Skipasmiðju til Klaksvíkar. Endamálið var at fáa flutt strandafaraskipið Scaniu, soleiðis at Clare hjá Smyril Line slapp framat.

## Fekk ikki lagt at

Rani Nølsøe, stjóri á Klaksvíkar Havn, greiðir frá, at ætlanin var, at Clare skuldi koma norð til Klaksvík við farmi, og síðan skuldi skipið eisini takað nakað av førningi frá vinnuni av oynni.

Men fyri at Clare kundi sleppa framat, mátti Scania fyrst flytast.

Men illa gekst í hond, og Clare mátti fara avstað aftur uttan at hava fingið lagt at nakrastaðni.

– Hóast vit ringdu til øll, sum hava nakað við verkfallið at gera, so fingu vit einki gjørt, sigur Rani.

Starvsmannafelagið vildi als ikki hoyra talan um, at Scania skuldi verða flutt, og tá hon liggur soleiðis fyri, at einki størri skip fær lagt at, so var einki at gera. Clare mátti venda við aftur.

– Úrslitið av øllum var, at ein rúgva av tíð og orku fór til spillis, sigur Rani



*Clare hjá Smyril Line mátti venda við aftur*



*Starvsmannafelagið vildi ikki hoyra talan um, at Scania skuldi flytast, soleiðis at Clare kundi leggja at*

## Rakar skeivt

– Verkfallið er vorðin ein faklig konflikt, sum rakar fullkomiliga skeivt, heldur Rani.

– Eg skal ikki siga, hvørt tað er rætt ella skeivt, at skipini hjá Standfaraskip Landsins eru farin úr sigling. Men tað kann als ikki vera rætt, at skipini skulu nýta pláss, sum vinnan hevur brúk fyri, sigur Rani og sipar til Scaniu, sum í løtuni liggur á einum plássi, sum Klaksvíkar Havn hevur tørv á at nýta.

– Harumframt ávirkar verkfallið vinnulívið her norðuri. Vinnan liggur inni við allari produktión av ymsum slag, og hetta kostar teimum eiga rúgvu av peningi, greiðir Rani frá.





Ferðaætlan fyri Seig 1000 vikuskiftið 10-12 mai

| | |
|---|---|
| Sørvág | 10. mai kl. 21.00-23.00 |
| Sørvág | 11. mai kl. 09.00-12.00 |
| Runavík | 11. mai kl. 14.00-18.00 |
| Tórshavn | 11. mai kl. 20.00-23.00 |
| Tórshavn | 12. mai kl. 09.00-11.30 |
| Klaksvík | 12. mai kl. 14.00-18.00 |

Fyrivarni skal takast um veðrið ikki er til vildar